# Føroysk oljufeløg gjørdu hál

**Tey bæði føroysku oljufeløgini, Føroya Kolvetni og Atlants Kolvetni, standa seg væl í seinastu útbjóðingini til leiting eftir kolvetnum á bretska landgrunninum. Úrslitið av 22. útbjóðing er júst almannakunngjørt. Tað vísir, at stórur áhugi er fyri økjunum, sum liggja nær føroyska landgrunninum og hetta kann fáa hepna ávirkan á okkara egnu útbjóðing**

OLJULEITING
Jan Müller
jan@sosialurin.fo




*Oddafólkini í Føroya Kolvetni kunnu so sanniliga vera sera nøgd og errn av úrslitinum av útbjóðing í bretskum øki. Her Graham Stewart og Niels Sørensen, sum fegnast um úrslitið*
*Mynd Jan Müller*

Áhugin fyri at leita eftir olju og gassi á Atlantsmótinum er aftur farin at vísa seg av álvara. Úrslitið av 22. útbjóðingini á bretska landgrunninum vísir, at oljufeløg nú av álvara eru farin av seta ljóskastaran á økini vestan fyri Hetland og her ikki minst økini, sum liggja tætt upp at føroyska markinum.

Fleiri av teimum stóru oljufeløgunum eru við. Eitt nú BP og Shell, ChevronTexaco, ENI og Statoil, Amerada Hess, BG, Total, Dong og síðani fleiri onnur smærri feløg so sum OMV og síðani tey bæði føroysku oljufeløgini, Føroya Kolvetni og Atlants Kolvetni.

Áhugavert er at síggja, at Føroya Kolvetni er við í fleiri loyvum, og at tað haraftrat er vorðið fyristøðufelag í tveimum loyvum. Hitt føroyska oljufelagið, Atlants Kolveteni er við í einum av loyvunum. Tey hava lut í tilsamans sjey loyvum, sum m á sigast at vera nógv.

Vit síggja, at eitt felag sum ChevronTexaco er við í rættiliga nógvum loyvum, og hetta bendir á, at úttalilsini hjá umboðum fyri felagið eitt nú á oljuráðstevnuni í Føroyum í fjør, stava frá einum veruligum ynski um at finna olju og gass á Atlantsmótinum. Felagið er fyristøðufelag í ikki færri enn fýra loyum, saman við feløgum sum Dong, Statoil, OMV og Føroya Kolvetni. Loyvini, sum nú eru latin, eru kanningarloyvi, uttan at feløgini hava bundið seg til at bora. Men í ávísum førum eru brunnar á skránni so sum hjá ChevronTexaco og Dong í økjum nær markinum.

Samanumtikið ber til at siga, at 22. runda í bretskum øki kann fáa postivar avleiðingar fyri 2. rundu á okkara landgrunni. Hugsandi er at fleiri av feløgunum eru áhugað í at bjóða uppá loyvi, sum liggja beint hinumegin markið, har tey hava fingið loyvi á bretskum øki. Nú meira enn tveir mánaðir eru eftir til umsóknir skulu vera inni, og loyvini longu eru latin í bretskum øki, so hava jarðfrøðingarnir og onnur fólk hjá oljufeløgunum nú møguleika til at »kasta« seg yvir føroysku útbjóðingina og brúka kreftir uppá hana. Hinvegin ber eisini til at hugsa sær, at tey feløg, sum hava fingið fleiri góðar bitar í bretsku runduni, vilja hava eina pausu og leypa 2. rundu á føroyska landgrunninum um. Tað kann gera seg galdandi fyri nøkur feløg, men fyri tey stóru feløgini, sum hava eina strategi á Atlantsmótinum og sum veruliga trúgva uppá framtíðar møguleikar her, vil tað eisini vera náttúrligt at rokna við, at tey vilja kanna sær teir góðu bitarnar hinumegin – tvs. okkara megin markið eisini, soleiðis at tey hava samanhangandi loyvi tvørtur um markið.


WWW.SMYRIL-LINE.COM



**Sølufólk til farmadeildina**

**Vit søkja eftir sølufólki til farmadeildina.**

Farmadeildin er ein deild hjá Smyril Line, ið heldur til í pakkhúsinum við Eystaru Bryggju.

**Arbeiðsuppgávur:**
Uppgávur tínar verða, umframt at troyta verandi og alternativar farmaflutningsmøguleikar, at ráðgeva, vegleiða og røkja samskiftið við viðskiftafólk okkara. Sum seljari fært tú eisini sum uppgávu at geva tilboð og skriva kontraktir.

**Førleikakrøv**
- At tú ert ein seljari við stórum **S**
- Dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- Dugir at veita viðskiftafólki okkara holla vegleiðing
- Tænastuhugað/ur og góð samstarvsevni
- Tað er ein fyrimunur at hava royndir og útbúgving innan sølu

Vit bjóða eitt starv við stórum avbjóðingum. Mennandi arbeiðsumhvørvi og góðar starvsfelagar.

Løn sambært avtalu.

Umsókn við møguligum prógvum og CV skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 20. september og skulu stílast til:

*Smyril Line*
*Postsmoga 370*
*FO-110 Tórshavn*
*Att.: Heðin Joensen*
*ella við telduposti til: hedinj@smyril-line.fo*

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Heðin Joensen, leiðara á farmadeildini, á tlf. 34 59 62.

Eystara Bryggja · Postsboks 370
FO-110 Tórshavn · Tlf: 34 59 60
Fax: 34 59 52 · cargo@smyril-line.fo

WWW.SMYRIL-LINE.COM



**Skrivari til farmadeildina**

**Søkt verður eftir skrivara til farmadeildina.**

Starvið umfatar millum annað vanligt skrivstovuarbeiði og samskifti av ymiskum slag.

**Arbeiðsuppgávur**
Tú kemur at taka tær av ymiskum skrivaraarbeiði, sum at samskifta við viðskiftafólk, samskipa fundir, arkivera og gera sjálvstøðugar skrivligar uppgávur, sum brævasamskifti, fundarfrásagnir, samandráttir o.a.

**Førleikakrøv:**
- Dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- Skal duga føroyskt og enskt í skrift og talu
- Góðan teldukunnleika
- Tænastuhugað/ur og góð samstarvsevni

Løn sambært avtalu.

Umsókn við møguligum prógvum og CV skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 20. september og skulu stílast til:

*Smyril Line*
*Postsmoga 370*
*FO-110 Tórshavn*
*Att.: Heðin Joensen*
*ella við telduposti til: hedinj@smyril-line.fo*

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Heðin Joensen, leiðara á farmadeildini, á tlf. 34 59 62.

Eystara Bryggja · Postsboks 370
FO-110 Tórshavn · Tlf: 34 59 60
Fax: 34 59 52 · cargo@smyril-line.fo




# Sjálvstýriskyndilin hevur lýst bjartari

**– Heldur enn at minnast 14. september sum ein vanlagnudag eiga vit í framtíðini at gera 14.september til dag vónarinnar. Vit mugu royna at peika frameftir heldur enn at ilskast um fortíðina, helt Høgni Hoydal á 14. septemberhaldinum týskvøldið**

14. SEPTEMBERHALD
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*Á kvøldsetuni framførdu Kári Sverrisson, Jón Tyril og Bass Njai úr Gambia*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Fullveldisfólk hava sæð betri dagar. Áræðið og framfýsni á fullveldisøkinum eru skift út við ørkymlan. Tjóðveldisflokkurin er settur í andstøðukuldan og hjartamál floksins, fullveldistøkan, hevur breiða samgongan sett á síðulinjuna hetta valskeiðið.

Hetta er fatanin eftir 14. septemberhaldið á Læraraskúlanum týskvøldið. Við undirheitinum "Eru Føroyar settar í bakkgear" bjóðaði Tjóðveldisflokkurin, Suðurstreymoyar Tjóðveldisfelag og Unga Tjóðveldi til kvøldsetu til minnis um Fólkaatkvøðuna 14. september í 1946.

Góð 150 fólk vóru komin saman í Læraraskúlahøllini. Eldra- og miðal ættarliðið vóru vælumboðað á kvøldsetuni, meðan fá ung fólk møttu.

## Fortíðin heldur enn framtíðin

Tey fýra Hildur Eyðunsdóttir, Heini O. Heinesen, Annita á Fríðriksmørk og Høgni Hoydal fluttu fram røðu á kvøldsetuni.

Hóast talan ikki var um ein politiskan fund, men eina kvøldsetu um 14. september 1946, hevði tú væntað nakrar røður um, hvussu Tjóðveldisflokkurin í 2004 vil virka fyri, at hjartamálið, fullveldismálið, aftur kemur á breddan í Føroyum í eini tíð, har sitandi samgonga ikki raðfestir fullveldismálið eins høgt sum undanfarna samgonga.

Men so varð ikki. Heldur enn at leggja orkuna í nútíðina og framtíðina vóru stórar partar av røðunum um beistagerðina hjá dønum, tá teir skúgvaðu føroyskan fólkaviljan til viks í 1946, hóast oyggjasamfelagið í Norðuratlantshavið atkvøddi fyri loysing. Í røðu síni kom formaður Tjóðveldisfloksins, Høgni Hoydal, kortini inn á spurningin um framtíðina og fortíðina.

– Heldur enn at minnast 14. september sum ein vanlagnudag eiga vit í framtíðini at gera 14. september til dag vónarinnar. Vit mugu royna at peika frameftir heldur enn at ilskast um fortíðina, segði Høgni Hoydal.

## Hæddarpunktið

Hæddarpunktini á kvøldsetuni vóru uttan iva tónleikurin og sjónleikurin. Kári Sverrisson, Jón Tyril og Bass Njai úr Gambia stóðu fyri tónleikinum, meðan garparnir úr Grímu, Hans Torgarð og Bárður Persson, høvdu játtað at spæla eitt petti úr Søgunum úr Krabburð

Kári, Jón og Bass spældu løg hjá Kára Sverrissyni og hjá Bass Njai. Við einføldum gittarspæli og trummum hugtók Kári Sverrisson enn einaferð.

Hans Torgarð og Bárður Persson framførdu eitt petti úr skemtiliga politiska fundinum úr sjónleikinum, Søgur úr Krabbur, og láturin rungaði í Læraraskúlahøllini, tá frálíku sjónleikararnir framførdu stuttliga leikin.



*Láturin rungaði í Læraraskúlanum, tá Hans Tórgarð og Bárður Persson framførdu Søgur úr Krabburð*
*Mynd: Jens Kr. Vang*



*Bárður Persson og Hans Torgarð spældu eitt petti úr Søgur úr Krabburð. Á myndini sæst Bárður Persson flyta fram røðu á politiskum fundi í Krabbur*
*Mynd: Jens Kr. Vang*